## Rosenborg setti Toda og teir upp á pláss

Start megnaði einki í útidystinum ímóti Rosenborg í norsku tippuliguni sunnudagin. Sigursvanda felagið úr Tróndheimi var greitt við yvirlutan og vann 3-0. Todi Jónsson var á beinkinum frá byrjan, men tá ið 74 minuttir vóru spældir – og støðan longu var 3-0 – kom hann á vøllin. Todi hevði eina roynd í síðsta minutti, men verjuspælari blokeraði skotið.



## Jón Rói hugdi at

Jón Rói Jacobsen sat á beinkinum allar 90 minuttirnar, tá ið AaB sunnudagin spældi enn ein javnleik í donsku superliguni. OB var á vitjan í Aalborg, og einki mál kom í dystinum. Jón Rói hevur verið fastur maður í verjuni hjá AaB, men sunnudagin var hann settur á beinkin, og har sat hann allan dystin. Súni Olsen var ikki við í hópinum hesaferð.

# Felagsliðið vinnur hvørja ferð

**Hjá NSÍ kann velduga avbjóðingin á heimavølli móti oddaliðnum verða møguleikin, sum skal til fyri at venda keðiligu gongdini**

**4. UMFAR**
*Jóannes Hansen*



*EB/Streymur er einasta liðið, sum enn hevur fulla úrtøku. Tvær ferðir um páskirnar megnaði liðið at vinna dystir í seinastu minuttunum, og tað verður vanliga tikið sum gott tekin*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

Í Onglandi plaga teir at siga, at tað fyri endaliga úrslitið av kappingini hevur stóran týdning, hvussu úrtøkan er um høgtíðina. Tá verður hugsað um jólini og nýggjárið, tá ið fleiri umfør eru á skránni í landskappingini.

Heima á landi vóru tvey umfør á páskum – Skírisdag og 2. páskadag. Fyri ítróttarskrivarar og tey, sum dáma væl at fylgja við í ítróttinum í bløðunum var hetta einki serligt, tí tað eru eingi bløð frá skírisaftan og til 3. páskadag. Nú er tað kortini frægari, enn tað plagdi at vera á tann hátt, at tað ber til at samskifta við lesararnar umvegis portalin. Men tað er ikki nóg gott.

3. og 4. umfar eru fingin frá hondini. EB/Streymur var einasta felagið, sum fekk fulla úrtøku burturúr báðum umførunum. B36, B68 og KÍ fingu fýra stig. GÍ, HB og Skála fingu trý stig. At NSÍ bara fekk eitt stig, og at ÍF og VB/Sumba framvegis einki stig eiga á kontini undirstrikar, at støðan ikki er góð hjá teimum.

Undan kappingarbyrjan varð tað roknað við, at bæði VB/Sumba og ÍF fóru at fáa tað torført. Serliga hjá ÍF hevur tað gingið illa við fólki, og nú var tað heilt forgjørt, at hjálparvenjarin og álitið í verjuni, Símun Eliasen, breyt armin á Mølini. Soleiðis er ofta, tá ið tað frammanundan gongur illa.

Undan kappingarbyrjan tóktist roknistykkið, sum segði, at NSÍ skuldi hava fulla úrtøku, áðrenn teir fóru í Gundadal at spæla móti HB, ikki at vera við síðuna av. Teir høvdu undan havnarferðini verið í Vági og spælt móti B68 og KÍ á heimavølli. Nú hevði NSÍ bara fýra stig undan stóru avbjóðingini í Gundadali. Sovorðið tyngir, og tað sást aftur í hugburðinum, at teir í NSÍ hava tað tungt. Eftir ágangandi fyrstu løtuna fór luftin úr ballónini, tá ið teir vóru fyri mótgongd. Tað ber við sær, at Trygvi Mortensen og hjálparmenninir hjá honum nú skulu arbeiða við heilt øðrum lutum, enn tað fyri ikki so langari tíð síðani varð roknað við.

Næstu ferð verður EB/Streymur gestur í Runavík. Tað er stór avbjóðing hjá liði, sum ikki hevur staðið seg nakað serligt. Men tað ber eisini til at venda tí tann vegin, at hetta júst er møguleikin hjá NSÍ at venda gongdini. Troystin má vera, at enn er kappingin lítið liðin, og enn eru tað 70 stig eftir at spæla um!

Hjá EB/Streymi gongur tað, sum tað ofta ger hjá toppliði. Hóast teir móti GÍ fyrst fingu mál ímóti sær, so megnaðu teir at reisa seg, og tað boðar frá góðum, tá ið tað eydnast at fáa sigursmálið í síðstu løtu. Hetta var fyrsta ferðin, at GÍ tapti í ár.

Eftir laka úrtøku Skírisdag vóru B36 og HB 2. páskadag aftur har, sum tey plaga at vera. At B36 sigurin í Vági var so tepur, hóast teir beinanvegin fingu stórt páskaregg frá heimaliðnum, boðar kanska frá, at tað ikki verður heilt so lætt at fáa øll stigini frá VB/Sumba, sum tað higartil hevur verið.

Tað er hópin stuttligari hjá B68, enn tað hevur verið. Javnleikur í Runavík og sigur á Skálafjørðinum telur nógv á Skálafjørðinum! Serliga í 2. hálvleiki var KÍ avrikið í Fuglafirði einki at reypa av. Men KÍ fekk stigini við sær um fjørðin, og tað ber við sær, at fótbóltslagið er gott í Klaksvík.

Í fimta umfari, sum verður sunnudagin 23. apríl, sær skráin soleiðis út: GÍ-ÍF, NSÍ-EB/Streymur, Skála-HB, B36-B68 og KÍ-VB/Sumba.

## Meira ítróttur í morgin

Tíverri er talan um plásstrot í blaðnum, sum lesarin situr við. Tað merkir, at vit partur av ítróttinum ikki verður í blaðnum fyrr enn í morgin. Millum annað kann tá lesast um stóra gallkvøldið, sum hondbólturin hevði mikudagin, eins og øll hagtøl v.m. frá fótbóltinum um páskini eisini verður í mikudagsblaðnum.

**-mørk**




GITIÐ LEIKARAN



**Kappingarreglur**

Frá mánadegnum 3. apríl og í 15 fylgjandi Sosialum verður andliti á einum kendum føroyskum fótbóltsspælara at síggja. Myndin er tó viðgjørd nakað, soleiðis at tað verður truplari at vita, hvør spælarin er.

Á síðu 31 í fótbóltsblaðnum, sum var partur av VikuskiftisSosialinum, eru 15 tómar reglur. Á hesar skulu nøvnini á teimum 15 spælarunum setast.

Tá hetta er gjørt, skal blaðsíðan við nøvnunum sendast okkum. Seinasta freist fyri innlatan er mánadagin 1. mai. Navnið á vinnaranum verður kunngjørt í Sosialinum tann 4. mai.

Minnist til at skriva navn, bústað og telefonnummar á seðilin, sum verður sendir okkum.

Verður avrit av síðuni sent okkum, verður hetta ikki roknað sum gyldugt luttøkuprógv.

Vinnið fótbóltsupplivingina Skotland - Føroyar

ATLANTIC AIRWAYS